

## Eg veit ikki, hvat vit nú gera

# Alvorligt bakkast fyri føroysk sjófólk

**VEÐRIÐ** Ger Løgtingið álvara av at strika veðurtíðindini frá DMI, er tað ein øgiliga keðilig niðurlaging av føroyskum sjófólki sigur formaðurin í Reiðarafelagnum

Áki Bertholdsen

- Hetta ljóðar ikki gott, tí hatta er eitt øgiliga keðiligt spor hjá Løgtinginum at koma inn á.

Viberg Sørensen, formaður í Reiðarafelagnum, er alt annað enn fegin, tá ið vit í gjárkvøldið fortaldu honum tíðindini um, at Løgtingið nú ikki longur vil betala fyri at fáa serskild verðurtíðindi frá DMI fyri Føroyar.

Hann tekur hetta sum eina niðurraðfesting av sjófólki.

Harafturat er DMI høgt í metum hjá formanninum í Reiðarafelagnum.

- Tað ber til at fáa veðurtíðindini nógva staðni, men DMI hevur serskild veðurtíðindi fyri okkara sjóøki og veðurforsagnirnar haðani eru serstakliga góðar og neyvar.

- Veðurtíðindini frá DMI eru nakað av tí besta, sum er og rættiliga nógv føroysk sjófólk brúka DMI at fáa veðurtíðindini frá.

- Men verða tey bestu veðurtíðindini tikin frá okkum, eru vit á heilt skeivari kós.

Viberg Sørensen sigur, at tað kann fáa álvarsligar avleiðingar, at ein siglandi tjóð, sum okkara, ikki hevur neyv og álítandi veðurtíðindi.

Hann stúrir serliga fyri bátunum og teimum smærru skipunum.

- Sum skilið er blivið, hevði tað verið nógv betri at veðurtænastan ongantíð var yvirtikin frá dønum, sigur Viberg Sørensen, sum annars metir seg sjálvan at vera rættiliga sjálvstýrissinnaðan.

aki@



# Bjartar vónir - ongir pengar

Tað var ein stolt løta hjá Tórbirni Jacobsen, táverandi landsstýrismanni í tilfeingismálum, tá ið hann fyri tveimum árum síðani hátíðarliga almannakunngjørdi, at nú skuldu føroyingar yvirtaka veðurtænastuni frá dønum.

Hann segði, at at einki annað land hevur meiri brúk fyri eini vælvirkandi veðurtænastu enn Føroyar og tí mátti tænastan yvirtakast.

Og tað treyt ikki við bjørtum vónum um eina sjálvstøðuga, føroyska veðurstøð við fleiri veðurfrøðingum, sum skuldi veita okkum bestu og neyvastu veðurtíðindini og veðurforsagnirnar, sum hugsast kundi.

Men tað var nokk so skjótt, at luftin fór úr veðurballónini, tá ið tað gjørdust greitt, at Løgtingið helt, at tað høvdu vit yvirhøvur og aldeilis ikki ráð til, hóast tað bara var mett at kosta seks milliónir um árið.

Tí varð ein avtala ístaðin gjørd við donsku veðurtænastuna, DMI, um at gera veðurtíðindi og veðurforsagnir fyri Føroyar.

Men nú hava vit heldur ikki ráð til at betala fyri hesa avtaluna longur og tí má hon sigast upp.

Og tá ið hon er farin úr gildi, hava føroyingar onga veðurtænastu yvirhøvur.

## VEÐURBALLÓNIN BRAST

*Tað er sera álvarsamt, at vit nú ongan stovn hava, sum kann gera serskild veðurtíðindi og serskildar veðurforsagnir fyri Føroyar, heldur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum*